## Ivast í álopsspæli

Føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst var misnøgdur við álopsspælið hjá Silkeborg í dystinum ímóti FC Midtjylland um vikuskiftið. Silkeborg tapti dystin 2-0. – Vit mugu spyrja okkum sjálvar, um vit skapa nóg nógvar kjansir, og um teir kjansir, sum vit skapa, eru nóg stórir, segði Holst eftir dystin. Hann heldur, at Silkeborg hevur okkurt at betra við álopsspælinum til komandi dystir.



## Slapp ikki at spæla

Danska 1. deild hevði sítt fyrsta umfar um vikuskiftið, men nógvir av dystunum í Danmark vórðu avlýstir, tí vøllirnir eru ikki til at spæla á eftir ein langan og kaldan vetur. Atli Danielsen skuldi spæla sín fyrsta veruliga dyst fyri FC Roskilde, men dysturin, sum skuldi verða ímóti FC Vestsjælland, varð avlýstur orsaka av vallarviðurskiftunum. Ivasamt er eisini, um næsti dysturin hjá Roskilde kann spælast.

# Mjølnir kom sterkt aftur

**Eftir fyrra dystin leygardagin sá einki út hjá klaksvíkingum, sum tvey tey síðstu settini blivu sópaður av vøllinum. Men í gjár høvdu teir lisið væl uppá og megnaðu at vinna á SÍ, so FM-heitið ikki verður avgjørt fyrr enn leygardagin í triðja finaludystinum á Giljanesi**




Hilmar Jan Hansen



Frøin á klaksvíkingunum var øgilig inni á vøllinum, tá teir í gjár høvdu vunnið seinna finaludystin og tí liva enn í kappingini um føroyameistaraheitið, sum skal avgerast á Giljanesi leygardagin
Mynd: Álvur Haraldsen

Báðar mansfinalurnar á Eiði um vikuskiftið blivu fimmsettarar, og so jøvn, sum liðini tykjast vera, er slett ikki óhugsandi, at fimm sett eisini skulu til, áðrenn vit leygardagin fáa at vita, um tað verður SÍ ella Mjølnir, ið verður føroyameistari í mansflogbóltinum í vetur.

Dysturin leygardagin var ikki nakað serligt at reypa av, og serliga Mjølnir kom illa burtur úr honum. Klaksvíkingarnir vunnu fyrsta sett 25-19, og so svaraði SÍ aftur við at vinna annað sett 25-21, áðrenn liðini spældu eitt maratonssett, sum ikki endaði, fyrr enn Mjølnir hevði vunnið tað 30-28.

Men tá so fjórða sett kom, var tað SÍ, ið sat á øllum og ongantíð loyvdi Mjølnir upp í part. Beinanvegin struku sørvingar avstað, og teir bókstaviliga vundu burtur úr Mjølnir, 25-12, sum hevði fingið eitt gult kort í triðja setti og aftur fekk eitt í fjórða, samstundis sum orkan sá út til at verða brúkt til alt annað enn flogbóltsspælið.

Í fimta setti var sama gongdin, og SÍ var snøgt sagt betri á øllum økjum og vann bæði sannførandi og uppiborið, 15-9. Síðstu tvey settini var klassamunur á, og Mjølnir sá hvørki út til at orka ella evna tað, sum skuldi til fyri at vinna á sørvingum.

### Vent í holuni

Seinni dysturin, sum var spældur í gjár, byrjaði nakað líknandi dystinum dagin fyri, tí Mjølnir vann fyrsta sett 25-17, og so tók SÍ annað sett 25-19. Serliga í øðrum setti vóru nógvar og góðar duellir, sum gjørdu tað stak undirhaldandi og spennandi hjá áskoðarunum.

Hetta helt fram í triðja setti, har SÍ fyrst á út til at fara avstað, men ikki ordiliga slapp, fyrr enn eftir at støðan hevði verið 16-17. Tá fekk Mjølnir ikki ordiliga fylgt við meira, og SÍ vann settið 25-20.

Í triðja setti var øgiliga javnt allan vegin uppeftir, men eitt skifti sá út til, at Mjølnir fekk skapt eitt hol niður til SÍ. Men í evstu løtu komu sørvingar afturíaftur, og eitt skifti vóru bara tvey stig á muni, áðrenn Mjølnir fór við settinum og vann 25-22.

Øvugt var í fimta settinum, tá SÍ byrjaði betur og kom framum 4-1 og helt munin fram til 7-3. Men so hevði Mjølnir hug at nærkast, men slapp bara ikki framum. Fleiri ferðir var javnleikur, men tað var alla tíðina SÍ, sum fór framum aftur, líka til støðan var 12-12. Tá eydnaðist Mjølnir at toga seg framum, og SÍ megnaði ongantíð at svara aftur, og so vann Mjølnir settið 15-13 og dystin 3-2.

Frøin á klaksvíkingunum var øgilig inni á vøllinum, tí teir vóru í veruleikanum komnir sterkt aftur og fingu víst, at alt kann henda í einari finalu. Leygardagin sóu teir lidnir út, men í gjár raknaðu teir við aftur, so tí kann eisini alt henda, tá SÍ og Mjølnir spæla triðju og altavgerandi FM-finaluna í ítróttarhøllini á Giljanesi leygardagin klokkan 15.30.

## FAKTA

**Leygardagin 20/03:**
SÍ-Mjølnir 3-2 (19-25, 25-21, 28-30, 25-12, 15-9)

**Sunnudagin 21/03:**
SÍ-Mjølnir 2-3 (17-25, 25-19, 25-20, 22-25, 13-15)



**Ólavur Jensen, hevarin hjá SÍ, sat bara og stardi fram fyri seg, tá tað var miseydnast hjá sørvingum at tryggja sær meistaraheitið longu í gjár**
Mynd: Álvur Haraldsen

## Ótrúliga súrt

Ólavur Jensen, hevari hjá SÍ, var sera vónbrotin, sum hann sat har á hallargólvinum eftir tapta dystin í gjár.

– Framvegis er ein kjansur eftir, men tað er ótrúliga súrt, at vit ikki skuldu klára at tryggja okkum føroyameistaraheitið í dag, tí tað var tað, sum vit skuldu, sigur hann.

– Mjølnir spældi kanska heldur betur í dag, og vit gjørdu somu feilir, sum vit gjørdu í fyrra dystinum. Hetta eru tvey jøvn lið, men eg haldi, at vit hava munin, so eg rokni við, at vit taka teir leygardagin.

hil

## Tað stuttligasta

– Hetta er tað besta, tú kanst fáa í flogbólti. Fyri tað fyrsta er hetta ein finala, og so eru nógvir áskoðarar og ein tættur dystur. Vit vildu gjarna vunnið 3-0, men hetta er eisini gott, sigur Jón Syderbø í Mjølnir.

– Vit trúðu upp á tað í dag, samstundis sum vit royndu at minka um feilirnar hjá hvørjum einstøkum. Í gjár hugsaðu vit ov lítið um dystin, men í dag avtalaðu vit, at vit ikki skuldu hugsa um dómararnar ella aðrar spælarar, men spæla okkara spæl.

Jón ásannar, at talan er um tvey jøvn lið, so tí heldur hann tað vera væl hugsandi, at eisini triðja finalan endar við einum fimmsettara.

– Men tað allarbesta hevði verið at vunnið 3-0, tí so sleppa vit skjótari heim, og so verður ballið betri, flennir fegni Mjølnir-spælarin.

hil